TING-HELLAN

# TRIM, TRYGD og TWIN

TINGHELLUKLUMMAN
*Høgni Djurhuus*



Ikki vardi tað meg, at lítli naglaklipparin hjá mær kundi gerast ein hóttan móti heimsfriðinum. Naglaklipparin er keyptur í einum toluliga heiðurligum matvøruhandli fyri danskar krónur, ikki frá einum ónossligum eysturevropeiskum seyðatjóvi fyri amerikanskar dollarar. Trim eitur hann, og hann er hampuliga blankur enn og bítur væl. Upprunalandið er ókent. Hann er vissuliga effektivur, hevur gjørt av við manga ófantaliga negl. Men nakað morðvápn er hann ikki.

Fyri knappliga trimum árum síðani var eg á veg um borð á eitt flogfar í Kastrup. Tá eg bleiv skrivaður inn, skuldi eg vísa henni við syntetiska SAS-brosinum passið. Gamaní. Og so spurdi hon har innan fyri skivuna, um eg hevði nakað hvast í taskuni hjá mær, naglaklippara til dømis. Eg undraðist fyrst, áðrenn eg fekk svarað, á hesa nýíkomnu umsorgan hjá starvsfólkunum í Kastrup. Men, nei, tað hevði eg ikki. Einki hvast í taskuni. Legði afturat, at maðurin aftan fyri meg í halanum hevði hvassa tungu og upp aftur hvassari eygnabrá, tí hann hevði bíðað so leingi. Tað helt hon ikki var stuttligt.

"Det er desværre ikke vores problem bla bla bla.....".

Naglaklipparin var tíbetur í kuffertinum, sum longu var farið innum og afturum. So Trimmirin bleiv ikki konfiskeraður sum ein latent hóttan móti trygdini í luftini og heimstrygdini yvirhøvur. Eg havi hann enn. Hann liggur heima við hús í einum ólæstum skápi sum stuttbyrsurnar í USA.

Hetta var í teimum døgum, tá knívar, gafflar og skeiðir hjá flogfeløgunum aftur vóru úr plasti. Tað ber ikki til at drepa flogternur og flogskipararar við plastknívum. Teir brotna bara.

Vit vóru kortini ikki komin langt inn í árið null, so var vandin longu hasaður av. Eingin spurdi longur um naglaklipparar ella onnur hent amboð í handviðførinum. Og passið skuldi ikki upp úr lummanum. Á ársfundinum hjá Norðurlandaráðnum tað sama heystið, síðst í oktober, var Poul Nyrup Rasmussen, sum tá framvegis var beinharður forsætisráðharri, stuttligur í einari røðu fyri tí fína nordiska selskapinum á teimum spegilsblonku bonaðu gólvunum. Hann segði, at hann hevði ikki sæð ein norðurlending við knívi í aðrari hondini uttan so at hon hevði ein gaffil í hinari.

Knívar og gafflar úr stáli komu um sama mundið aftur í flogførini og lættari gjørdist at stykkja sundur pseudomatin hjá flogfeløgunum.

Fyrst í árinum null vóru naglaklipparar hóttan móti trygdini. Áðrenn roykurin á Manhattan var køvdur og tárini tornað, vóru stálknívar ikki nøkur hóttan móti trygdini.

### Er Bush fittari enn bin Laden?

Eg tori at viðganga, at eg var ikki við í grátikórinum tann 11. september og fyrstu dagarnar í árinum null. Tað ljóðaði snøgt sagt ov býtt, at heimsins besta fregnartænasta og heimsins besta løgregla onga ábending høvdu um, at nakrir dubiøsir menn, ja, enntá arabarar, verri fær tað ikki verið, vóru í statunum og fyrireikaðu 11.september. Fingu teir frið, tí USA hevði brúk fyri yvirganginum? Brúk fyri einum høvi, júst sum Pearl Harbor. Í kyniskum stórpolitikki hava 3.000 mannalív ongan týdning sum slík, heldur ikki tíni egnu mannalív, men tey hava stóran týdning fyri næsta leikin í stórpolitikkinum. Tey verða offrað fyri heildina. Og hví sluppu flogrænararnir um borð á flogførini við knívunum hjá sær, hóast smogan í trygdareftirlitinum gjørdi vart við teir?

Kemur tað fram ein góðan dag, at amerikanarar skipaðu sjálvir fyri rokinum tann 11.september 2001, detti eg ikki av stólinum ella vendi mær í grøvini av mistrúgvandi undran.

Vit kunnu antin viðurkenna kristna yvirgangin ella muslimska yvirgangin. Hvørgin er frægari enn hin. Men mátin er ikki tann sami. Tann kristni er sivilseraður og kallast fyribyrging. Tann muslimski er barbariskur og kallast terrorisma.

Hugaligt hevði verið at fingið staðfest eina ferð fyri allar, hví og hvar og nær hetta alt byrjaði. Hvør upprunin er. Hvør gálvaði fyrst. Vita vit tað, er lættari at fata og skilja. Og tað er neyðugt, tí fyribyrgingin og terrorisman og terrorisman og fyribyrgingin, ella í einum orði hevndin, vera so leingi fólk er á jørðini.

Er Bush fittari enn bin Laden? 1000 ungir amerikanarar hava fingið ein ræðuligan deyða í Irak. Hvør sendi teir hagar?

# 11/9 – kærleiki og sorg vinna á hatrinum

TINGHELLAN/POLITIKARANS HUGSAN:
*Kaj Leo Johannesen*



Hví eru tað menniskju sum beinleiðis eru stýrd av einum óndskapi, sum vit vanligu menniskju ikki fata? Hvørji virði hava hesi menniskju fingið við sær gjøgnum lívið og hvønn uppvøkstur hava tey havt?

Tað er eingin ivi um, at hesir menn, sum broyttu heimin til eitt ótryggari stað, ikki altíð hava verði so ávirkaðir av hatri. Teir hava ikki verði ymiskir frá tær og mær, tá teir bórust í heim, og tí er spurningurin, hvønn uppvøkstur og hvørjar treytir umheimurin hevur givið hesum monnum. Spurningurin kann setast um nú ikki vit øll hava ein part av ábyrgdini fyri at hetta hendi.

Kunnu vit bert siga at hetta vóru sinnissjúkir fanatikarar, sum framdu hetta álopið á púra ósek fólk? Hesir menn høvdu jú einki samband við-, og kendu ongan umborð á flogførunum, so tað var ikki nakað persónligt sum motiveraði til hesa gerð. Heldur var tað reindyrkað hatur mótvegis einum landi, eini religión, einum uttanríkispolitikki, sum motiveraði hesar menninar til at gera eina sovorðna gerð.

So er spurningurin: Kundu vit gjørt nakað fyri at forða hesum, og svarið er eitt greitt ja. Sjálvandi kundu vit forðað hesum.

Útreiðslurnar til hernaðarendamál vuksu í 2003 við 11 prosentum (til 5.850 milliardir krónur). Hækkingin er grundað á, at heimsins størsta og sterkasta land er av álvara farið í kríggj móti einum ósjónligum fígginda, uttan at vita, hvar fíggindin er staddur, og uttan at kunna staðfest ta veruligu orsøkina til hatrið frá víðgongdum terrorbólkum, sum eitt nú Al Quiada.

USA ger hetta fyri at gera heimin tryggari og fyri at vit øll kunnu gerast frælsari. Tí verða hesar astronomisku upphæddir brúktar, men gerast vit tryggari av tí? spyr fólkið á gøtuni. Eg trúgvi ikki at vit gerast tryggari av hesum. USA stendur í dag fyri umleið helvtini av øllum hernaðarútreiðslum í heiminum.

Síðani álopini á USA í september 2001 eru heimsins hernaðarútreiðslur hækkaðar við 18 prosentum og er hetta ein skeiv gongd síðani tað kalda kríggið endaði umleið 1999. Amerika brúkar í dag líka nógvan pening til hernaðarútreiðslur sum Reagan gjørdi í 80-unum, og líka nógv, sum teir brúktu undir Koreakrígnum og undir Vietnamkrígnum. Tað vil siga, at vit kunnu staðfesta, at Amerika er farið í kríggj móti einum ósjónligum fígginda. Hinvegin kunnu vit siga, at fíggindin í Vietnam var eisini ósjónligur, bert á ein annan hátt - djúpt inni í skóginum.

Sjálvandi ávirkar 11/9 okkum í Føroyum. Vit steðga á eina løtu og hava samkenslu við ofrunum fyri hesum atsóknum, men hetta kemur eisini at hava langtíðar ávirkan á okkara handilsviðurskifti. Tað sum hendi aftaná 11/9, tá talan er um sølu av fiskavørum, var at eftirspurningurin minkaði. Av tí at amerikanarar hildu seg burtur frá matstovum, eitt nú í Boston, var ein stór minking av fólki sum fór út at eta. Tey keyptu tað sum tey skuldu brúka í handlum og ótu heima.

Tað sum byrjaði í USA breiddi seg skjótt til Evropa. Einki er tað sama sum áðrenn 11/9 heldur ikki innan fiskasølu.

Vit koma at uppliva eina aðra tíð, har ið vit í nógv størri mun verða noydd til at leggja orku í at fáa menningarlondini upp á okkara livistøði. Hetta er einasta loysnin fyri at skapa ein ríkari og tryggari heim fyri øll, og fyri at forða altjóða yvirgangi at slá enn fastari røtur í heiminum.






Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

Gallarí Jinx

Mark Jiménez

Málningaframsýning í september

tel 317101 · jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

Tekniski Skúlin Klaksvík

## Undirvísari

Søkt verður eftir yrkislærara til útbúgvingar innan maskinøkið: Maskinlærlingar, SIT- og HT-næmingar.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin er útbúgvin innan maskinøkið. Maskinmeistaraprógv er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Tekniska Lærarafelag, lønartalva I og II. Tikið verður við starvinum 1. november 2004.

**Spurningar**
Áhugað kunnu fáa meir at vita við at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Freist**
Umsókn skal sendast skúlanum í seinasta lagi 27. september.

Umsókn sendast:

**Tekniski skúlin í Klaksvík**
Postrúm 20
FO-700 Klaksvík

## Avloysari

Søkt verður eftir avloysara fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi til 15. okt. 04.

Arbeiðstíð: 15 tíma vika.

Viðkomandi sum søkir, skal hava góðan kunnleika til Teldu (Navision Financials).

Umsókn við prógvum og ummælum skulu vera Sjúkrakassanum í hendi innan 20.09.04.

**Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi**
**FO-800 Tvøroyri**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

### Søkt verður eftir
## verkstaðarassistenti
### til El-deild skúlans

Umsøkjari skal vera handverkari við minst 5 ára starvsroyndum.
EDV kunnleiki á brúkarastøði er ein fyrimunur, eins og víðari útbúgving er ein fyrimunur.

**Arbeiðið umfatar:**
- Umvæling av amboðum og útbúnaði.
- Innkeyp av tilfari.
- Umsiting av tilfarsgoymsluni.
- Verða lærarum til hjálpar í samb. við verkligu undirvísingina.
- Umsiting av bygningum og øki uttanum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Handverkarafeløgini.

Skrivlig umsókn merkt »verkstaðarassistentur« skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. sept. 2004.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, leiðandi lærara á el-deildini á tlf. 311269 lokalnr. 30.

Starvið verður sett skjótast tilber.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
e-mail: tst@tst.fo

## Handil til sølu

Ein væluppbygdur handil við meturvørum o.ø. og við stórum, føstum viðskiftafólkið, í miðjuni í Tórshavn, til sølu um nóg høgt boð fæst.

Skriva til Sosialin, Box 76, 110 Tórshavn.

**Bill.mrk. 170**

## Avloysara starv sum bókhaldari

Fyri fólk sum eru í barnburðarfarloyvi verður søkt eftir einum ella tveimun fólkum til bókhald okkara at byrja beinanavegin.

Talan er í fyrsta umfari um starvstíð uppá 3 til 4 mánaðir. Men kann tó møguliga seinni verða talan um fast starv.

Arbeiði umfatar alt vanligt bókhalds arbeiði, herundir avstemmingar og lønarbókhald v.m.

Avgjørdur fyrimunur er at viðkomandi hevur royndir við bókhaldsarbeiði og kann arbeiða sjálvstøðugt. Brúkar stutta tíð um at seta seg inn í tingini, og kemur skjótt upp í ferð.

Eisini er tað ein fyrimunur at viðkomandi hevur kunnleika til Navision Attain bókhaldsskipanina og til Com Data lønarskipanina.

Vit kunnu bjóða kappingarførar treytir.
Løn eftir avtalu.

Hevur hetta tygara áhuga, ring til okkara á telefon 477000 og spyr eftir Frímund ella send ein e-post til: frimund@vestlax.fo.

VESTSALMON
**P/F Vestsalmon**
Postbox 82
Fo-410 Kollafjørður

## Ársaðalfundur

felagsins verður sunnudagin 26. september.

Tíð og stað verður lýst seinni.

CISW

Sosialurin
www.sosialurin.fo

DVEYLAN
Gólv- og vegg vask



· Vinyl
· Linolium
· Flísar
· Teppir
· Veggir

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75